LM-045/2023

Fylgiskjal 13

Gudrun Mortansdóttir Nolsøe

Fra: Post <post@kvinnuhusid.fo>
Sendt: 23. september 2023 10:00
Til: Gudrun Mortansdóttir Nolsøe
Emne: SV: Uppskot til broyting í revsilógini (kynslig avnoyðsla og lokking) verður sent tykkum til ummælis

Góða Gudrun

Takk fyri skrivið. Vit í Kvinnuhúsinum hava eina viðmerking. Vit hava tosað saman um, hví orðið samlega verður brúkt:

§ 225, sum viðvíkur aðrar kynsligar gerðir enn samlegu,

Samlega ljóðar sum ein sjálvboðin gerð. Kundi verið orða tvungin samlega ella valdstøka.

Í frágreiðing frá Barnaverndarstovuni í ár, brúka tey valdstøka / neyðtøka. Áðrenn hevur mann brúkt samlega, men hevur síðani ásannað, at tað ber ikki til at hava samlegu við eitt barn. Tað er altíð valdstøka / rape.

Vinarliga vegna nevnd og grunn

Eyðvør Tausen Olsen
Leiðari í Kvinnuhúsinum

Fra: Gudrun Mortansdóttir Nolsøe <gudrunnolsoe@lmr.fo>
Sendt: 30. august 2023 09:38
Til: post@sorinskrivarin.fo; HEMOL@sorinskrivarin.fo; politi@politi.fo; MBO001@politi.dk; kif.faeroerne@krfo.dk; Elkin.Klettheyggj@krfo.dk; setur@setur.fo; 'bardurl@setur.fo' <bardurl@setur.fo>; Alfred Petersen <petersen@adv.fo>; Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Barna- og Útbúgvingar Málaráðið <bumr@bumr.fo>; kf@kf.fo; 'bvs@bvs.fo' <bvs@bvs.fo>; barnabati@barnabati.fo; Djóni Eidesgaard <djoni@barnabati.fo>; Ingmar Berg Mikkelsen <ingmarbm@gmail.com>; megd@megd.fo; Bárður Atlason Ísheim <bardur@megd.fo>; 'Amnesty International' <amnesty@amnesty.fo>; eda003@politi.dk; mail@psykolog.fo; Etiskaradid <er@er.fo>; Regin Berg <ReginB@er.fo>; kris@kris.fo; Post <post@kvinnuhusid.fo>; kvinnufelag@kvinnufelag.fo; kvinnusamskipanforoya@gmail.com
Emne: Uppskot til broyting í revsilógini (kynslig avnoyðsla og lokking) verður sent tykkum til ummælis

Uppskot til broyting í revsilógini (Kynslig avnoyðsla og lokking) verður við hesum sent tykkum til ummælis. Freistin at lata inn ummæli er mikudagin 27. september 2023.

Hjáheft verður uppskot til broyting av kapittul 24 í revsilógini sent tykkum til ummælis. Við uppskotinum verður ein nýggj áseting sett inn sum § 229 í kapittul 24, kynslig brotsverk. Ásetingin viðvíkur lokking (grooming). Samstundis verður § 225 víðkað til at fevna um kynslig avnoyðsla (sextortion). Somuleiðis verður § 228 víðka til eisini at fevna um lokking.

Uppskotið inniber yvirskipa hetta:

1) § 225, sum viðvíkur aðrar kynsligar gerðir enn samlegu, verður víðka til at fevna um føri, tá ið gerningsmaðurin fær órættaða til at fremja kynsligar gerðir á seg sjálvan.
2) § 228 sum ásetir á brot á ávísar ásetingar í revsilógini kann revsast, hóast gerningsmaðurin bert hevur verið ósketin í mun til tilstandin ella aldurin hjá órættaða, verður víðka til eisini at fevna um lokking.